**SERSTØK BYGGISAMTYKT UNDIR GRÁASTEINI**
SB_Tórshavn_undirGráasteini_2026_2026

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta fylgiskjali 1, og fevnir um matr. nr. 1094c og 1094d, Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir ella samanlagdir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa íbúðarbygging í økinum.

Stk. 2. Økið liggur í umráðisparti A1, sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlaður stakhúsabygging

Stk. 3. Sambært kap. II, § 5, stk. 10 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, at í serstakari byggisamtykt fyri eitt náturliga avmarkað øki kann verða loyvt at byggja íbúðir.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3 NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið skal nýtast til íbúðarbygging í upp til 3 hæddir, umframt fríøki og felags hentleikar til íbúgvar, sí fylgiskjal 2.

## §4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Íbúðarbygging má einans byggjast innanfyri byggifelt smb. fylgiskjali 2. Hjallar, skúrar og líknandi smáir bygningar kunnu byggjast í byggifeltinum og/ella í fríøkinum smb. fylgiskjali 2.

Stk. 2. Hús skulu byggjast við mønu.

Stk. 3. Mest loyvdu hæddir á bygging eru sum víst á fylgiskjali 3.

Stk. 4. Framsíður skulu sniðgevast við forskotnum veggjum og innvikum. Forskjótingar ella innvik skulu gerast fyri minst hvørjar 10 m. Fórskjótingin ella innvikið skal vera í minsta lagi 0,5 m. Áhongdir bygningslutir eru ikki at meta sum forskjóting ella innvik.

Stk. 5. Uppihaldsrúm skal gerast til íbúgvar í økinum, og skal hetta vera minst 2 $m^2$ fyri hvørja íbúð.

## §5. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og sambært fylgiskjali 2.

UPPSKOT

Stk. 2. Minst 1 parkeringspláss skal gerast fyri hvørja búeind, umframt parkeringspláss til fólk við rørslutarni.

**§6. ÚTSJÓND**

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggimyndugleikan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

**§7. BYGGING IÐ ER**

Stk. 1. Hendan byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

**§8. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR**

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

**§9. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI**

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

UPPSKOT




## Tórshavnar Kommuna

**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:1000 | | | | |
| **Dagur** | 09.01.2026 | **Journal** | 25/10305 | **Teknað** | RVH |




- Íbúðarbygging
- Vegur og parkering
- Fríøki

**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 2 | | | | |
| **Mát** | 1:500 | | | | |
| **Dagur** | 09.01.2026 | **Journal** | 25/10305 | **Teknað** | RVH |




| | |
|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>**Býarskipanardeildin** | |
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt undir Gráasteini, matr. nr. 1094c og 1094d |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 3 |
| **Mát** | |
| **Dagur** | 27.01.2026 · **Journal** 25/10305 · **Teknað** |